## Kanna ferðamannaskip



Danska sjóferðslustýrið kannar nú, um tað týska ferðamannaskipið "Deutschland" breyt galdandi reglur, tá tað var á ferð í Grønlandi fyri tveimum mánaðum síðani. Eygnavitni hava greitt frá, at skipið sigldi sera nær einum stórum ísfjalli í Ilulissat, og at støðan kundi lættliga verða hættislig fyri skip, manning og ferðafólk. Tvey fólk greiddu í síðstu viku frá, at skipið var bara nakrar fáar favnar frá tí stóra ísfjallinum, og hetta sæst eisini á myndum, sum vórðu tiknar av skipinum. Sjóferðslustýrið hevur biðið um at fáa myndirnar og fer nú at kanna, um skiparin helt galdandi reglur fyri sigling í ísi.

## Brenna brósthaldarar

Í Somalia hava islamistar bannað kvinnum at brúka brósthaldara, og tær, sum gera ímóti banninum, verða revsaðar. Tíðindastovurnar skriva, at í høvuðsstaðnum Mogadishu ganga vápnaðir menn í gøtunum og steðga kvinnum fyri at vita, um tær brúka brósthaldara. Tær, sum hava tað ólgógliga plaggið, fáa boð um at lata seg úr tí, og síðani fáa tær nøkur koyrlasløg beinanvegin. Brósthaldarin verður brendur. Sambært tíðindastovunum hava islamistarnir givið boð um, at Somalia skal stýrast eftir teimum harðastu sharia-lógunum.

# útflutningsráð



*Ein dupultkvartett úr Glyvra kirkju setti sín serstaka dám á setanina við nøkrum sangum og lagt varð fyri við "Tá ið teir sóu landið" og síðan "Dýrd á vík og vág..."*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

kundu semjast um nakað sum helst.

- Seinastu árini er tíbetur ein hugburðsbroyting farin fram her á landi, soleiðis at vit í størri mun síggja okkara granna sum samstarvsfelaga enn ein kappingarneyta.

Hann segði, at FaroExpo sum ráðstevna er eitt dømi um slíkt samstarv.

- Við hesari ráðstevnu fáa føroyskar fyritøkur møguleika at hittast og skifta orð um mál av felags áhuga. At knýta sambond og læra av royndunum hjá hvørjum øðrum – at fremja felags átøk, men sjálvsagt eisini at selja hvørjum øðrum tænastur.

Jørgen Niclasen helt fyri, at eisini vinnulívsfólk, sum ofta vilja elta sína egnu slóð, mugu savnast, knýta sambond og læra av hvørjum øðrum.

- Tað skal tí vera mín vón og inniliga áheitan á tykkum øll, ið savast á FaroExpo, at føroysk vinnulívsfólk finna saman í samstarvi. Fáið sum mest burtur úr hesi ráðstevnu og fáið sum mest burtur úr royndum og førleikum hjá hvørjum øðrum. Fáið sum mest burtur úr tykkara evnum og hugskotum og fáið sum mest burtur úr teimum møguleikum, sum samtíðin setir tykkum.

Hann legði aftrat, at fyritøkur ikki skulu vera bangnar fyri at brúka síni evni, soleiðis at onnur eisini kunnu fáa gleði av teimum.

- Tað man ikki fara at bila, um grannin forvinnur ein skilling, so leingi man sjálvur vinnur ein dála.

Landsstýrismaðurin helt fyri, at henda ráðstevna er eitt prógv um, at vinnan hevur tikið fyrsta stigið í teirri hugburðsbroyting, sum krevst fyri at náa longur fram á leið innan útflutningsvinnu.

- Eg vænti, at ein avgerandi fyritreyt fyri, at føroyskar fyritøkur kunnu standa seg í kappingini við onnur, er, at vit duga at samstarva innanhýsis, og at vit duga betri at samskipa okkara útflutningsátøk úti í heimi.

Hann segði, at hetta gerst best við einum tøttum dialogi millum vinnu og almennu myndugleikarnar, har partarnir eru tilvitaðir um fyritreytirnar og møguleikarnar hjá hvørjum øðrum.

### Skipa útflutningsráð

Jørgen Niclasen segði, at fyri tryggja eitt optimalt samstarv millum tað almenna og ymsu partarnar av útflutningsvinnuni, er uttanríkisráðið í løtuni í dialogi við vinnuna, um hvussu eitt slíkt samstarv betri kann skipast.

- Ætlanin er at finna fram til eina skipan, sum vinnan sjálv hevur verið við til at evna, og har vinnan sjálv er við til at seta dagsskránna.

Landsstýrismaðurin segði seg meta, at besti mátin at fremja hetta, er at skipa eitt sonevnt útflutningsráð, har vinnan og tann almenni myndugleikin í felag virka fyri at menna útflutningin.

- Okkara grannalond hava góðar royndir við hesum, og eitt tílíkt útflutningsráð kann eitt nú tryggja, at vinnan fær beinleiðis ávirkan á, hvussu handilspolitisku viðurskiftini verða løgd til rættis, og á hvørjum marknaðum størsta orkan verður løgd.

Jørgen helt, at eitt útflutningsráð eisini kann skapa betri fyritreytir fyri, at fyritøkur kunnu standa fyri felags útflutningsátøkum í øðrum londum og mest fæst burtur úr royndum og til tilfeingi, sum vit tilsamans ráða yvir.

- Uttanríkisráðið hevur sett skjøtil á hetta arbeiði. Tora vit og vilja vit – ja, so kunnu vit, segði landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, Jørgen Niclasen.



*Vinnustevnan FaroExpo varð sett í ítróttarhøllini í Runavík í morgun. Sosialurin, Rás2 og Portalurin eru við á stevnuni, og meira verður at frætta hiðani í dag og teir komandi dagarnar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*